F I S K I M Á L A R Á Ð I Ð

P/F Kinnfelli
á Heimaru Bryggju 6

370 Miðvágur

Fiskivinnustovan
08.09.2020
Fiskiloyvi nr. 60619

Kvotaskjal

Hjálagt sendir Fiskimálaráðið fiskiloyvi:

Vinnuligar fiskiveiðiroyndir eftir makreli í 2020

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Fiskivinnustovan
08.09.2020
Fiskiloyvi nr. 60619
Kvotaskjal

Royndarloyvi

Vinnuligar fiskiveiðiroyndir eftir makreli í 2020

Hetta royndarloyvið er latið samsvarandi ásetingum í § 50 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi, við møguligum seinni broytingum.
Loyvið heimilar royndarveiðu og áleggur skyldur og treytir, sum ásett í loyvinum.

Eigari:	P/F Kinnfelli
Skip:	KATRIN JÓHANNA
Kallimerki:	XPWC
Havnakenningarmerki:	VA 410
Gildistíð:	Frá: 08.09.2020
	Til: 31.12.2020

Veiðirættindi:	Fiskaslag	Makrelur
	Royndarveiða:	500 tons
	Fiskileið:	Ytra landleiðin
	Viðmerking:	Verkætlanin er samstarv millum Tavuna og Katrin Jóhonnu VA410. Royndarkvotan skal fiskast yvir minst 3 túrar og skipið skal avreiða millum 50-250 tons hvønn túrin av fyrsta floks køldum makreli, sum skal førast til Tavuna. Endamálið er at at meirvirka fiskin (meir enn heilfryst). Framleiða IQF glaseraði fløk (til keyparar, sum roykja fløkini til víðarisølu). Marknaðurin er Evropa. Framhald av innleiðandi royndum í 2018-19. Rávøra, sum ikki verður nýtt til liðugvøruframleiðsluna má takast av aðrari kvotu hjá skipinum enn royndarkvotuni. Rættindahavari: Tavan Sp/f - vegna Katrinu Jóhonnu
Reiðskapur:	Uppisjóvartrol	
	Nót	

Jákup Mørkøre

Treytir

Vinnuligar fiskiveiðiroyndir eftir makreli í 2020
Royndarloyvið verður latið samsvarandi ásetingunum í § 50 í nýggju løgtingslógini nr. 152 frá 23. des. 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin). Royndarkvotan er útlutað sambært Kunngerð nr.159 frá 30. desember 2019 um at skipa fiskiskapin eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2020 v.s.br.

Loyvið verður givið við m.a. fylgjandi serligum treytum:
Frágreiðing skal gerast og sendast Fiskimálaráðnum, tá royndirnar eru gjørdar (í seinasta lagi 31. des. 2020). Frágreiðingin skal lýsa:

- Hvussu royndarkvotan er fiskað? (Hvørji skip, hvørji royndarloyvi, nær og hvar er landað, hvussu nógv (GG: Samsvar skal vera við veiðitøl hjá Vørn)).
- Er øll royndarkvotan landað til matna. Um ikki hví er partur farin til ídnað?
- Er kvota nýtt til víðarivirkingar í landi skal ein massabalansa sendast inn sum vísir, hvussu kvotan er nýtt, og hvørjar vørur eru framleiddar (alt, sum kemur inn (kg) og alt, sum kemur burturúr(kg)).
- Hvørjar avtalur vórðu gjørdar við skipini/móttøkuvirkini/framleiðsluvirkini á landi í samband við framleiðsluna (serliga tey virkini sum víðariframleiða og turka svartkjaft til matna).
- Somuleiðis eigur frágreiðingin at greiða frá, hvørji úrslit eru komin burturúr, og hvussu hesi kunnu ætlast at ávirka framtíðar virksemið, herundir hvør virðisøking er farin fram av rávøruni (menningar- og nýskapanarvirðið, sum er skapt við royndunum).
- Vørn/Fiskiveiðieftirlitið skal, hvørja ferð royndarfiskiskapur fer fram, fáa fráboðan um hetta.
- Kvoturnar kunnu bert nýtast av teimum skipum/bátum, sum eru nevnd í umsóknini og sum eru góðkend til fiskiskap undir Føroyum av Vørn/Fiskiveiðieftirlitið. Kvoturnar eru ikki umsetiligar og kunnu ikki flytast yvir á aðrar skipabólkar. Kvotur og kvotapartar, sum ikki eru nýttir í ár, fella aftur til Fiskimálaráðið pr. 31. des. 2020.

Annars eru treytirnar sum vanligt við royndarloyvi, tvs.:

1. Skiparin skal fylgja reglunum um fiskiskap á føroysku landleiðunum, sum eru ásettar í lóg um fyrisiting av sjófeingi og kunngerðum.
2. Skiparin skal
a) boða Fiskiveiðieftirlitinum/Vørn frá, tá túrur/royndin byrjar (COE).
b) hvønn dag boða Fiskiveiðieftirlitinum/Vørn frá knøttstøðu og veiðinøgd flokkað á fiskasløg undanfarna samdøgrið (CAT)
c) og tá túrur/royndin endar (COX)
d. Fiskiførini, ið partrola í hesi verkætlanini, kunnu ikki skifta makkara.
e. Tá fiskifør trola saman, verður veiðan, sum er fingin undir partrolingini ella samtrolingini, vanliga skrásett javnt býtt millum fiskiførini, ið hava partrolað ella samtrolað. Í hesum føri ber kortini til hjá skipinum einsamalt at fiska kvotuna, sjálvt um partrolað verður við onnur skip í verkætlanini. (GG: Skipini mugu vera nevnd í umsóknini).
3. Royndarfiskiskapurin skal bert fevna um beinleiðis veiðu eftir makreli og norðhavssild.
Hjáveiða av svartkjafti/makreli/norðhavssild má ikki fara uppum 10% samlað og í mesta lagi 2% av upsa, toski, hýsu og kongafiski.
Er hjáveiðan størri í hvørjum háli, skal skiparin alt fyri eitt boða Fiskiveiðieftirlitinum/Vørn frá og flyta til annað øki, har útlitini at fáa fiskaslagi, ið royndirnar fevna um eru betri.
4. Royndarfiskiskapurin skal fara fram í samstarvi við og undir leiðbeining av Havstovuni og nágreinilig dagbók skal førast yvir royndirnar eftir leiðbeining frá Havstovuni. Avrit av veiðidagbókini skal sendast Havstovuni, tá biðið verður um tað, og tá royndartíðin er av.
5. Undir royndarfiskiskapinum skal øll veiða skrásetast. Longdarprøvar skulu takast (um Havstovan biður um hetta), og ein frystiprøvi skal takast regluliga eftir leiðbeining frá Havstovuni. Prøvar skulu merkjast

við dato, knøttstøðu, dýpi, hálnummar og navn á skipinum og frystur skjótast gjørligt.
6. Havstovan og/ella Fiskiveiðieftirlitið/Vørn skulu kunna hava fólk við skipinum, sum felagið ber kostnaðin av.
7. Um treytirnar í royndarloyvinum ikki verða hildnar, kann Fiskimálaráðið taka loyvið aftur.